Uttanríkis- og mentamálaráðið

Løgtingið.

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 19. januar 2021 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | TH/OYS |
| Ummælistíð: | 19. januar 2021 til 2. februar 2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið**

**§ 1.** Landsstýrismanninum í Uttanríkis- og mentamálum verður heimilað at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið.

*Stk. 2.* Útreiðslurnar til at fremja KT-heildarætlanina kunnu í mesta lagi verða 40 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2027.

# 1. Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsøkir til lógaruppskotið

Seinastu 15 árini er ein røð av ymiskum KT-skipanum ment til lestrarfyrisiting. Dømi um slíkar kt-skipanir eru Vitanet og Kervi í fólkaskúlanum, Smedemarksskipanin í ymiskum útgávum í Suðuroy, Klaksvík, Vestmanna og á Kambsdali, Tímaglasið á Glasir og Próvbókin á Setrinum.

Í 2019 staðfesti Undirvísingarstýrið (UVS) saman við leiðslunum á skúlum og útbúgvingarstovnum ein átrokandi tørv á nýggjum og betri kt-skipanum, og at støðan á fleiri økjum er alsamt meira hættislig.

Mest álvarsamt er, at skipanirnar ikki liva upp til verandi krøv um KT-trygd og persónsdátuvernd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur saman við Undirvísingarstýrinum og Námi staðið á odda fyri eini tilgongd um strategi, har eitt verkætlanartoymi frá september 2019 til august 2020 hevur gjørt forkanningar í Føroyum og kannað støðuna í Norðurlondum.

Forkanningarnar staðfestu:

- At eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og verju av persónsupplýsingum. KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar
- Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri ráðlegging, umsiting og menning
- Somu dátur verða skrásettar fleiri ferðir; upplýsingar eru ofta truplar at fáa fatur á og verða manuelt skiftar millum skúla og myndugleikar
- Dupultskrásetingin hevur við sær feilir í málsviðgerðini, ger eftirlit hjá myndugleikum tungt og elvir til óneyðugar útreiðslur
- Ónýttir menningarmøguleikar liggja í at samskipa alt KT-virksemið í undirvísingverkinum: at keypa telduútgerð og KT-skipanir í felag, at skipa fyri felags rakstri og support og í felag at gagnnýta tvørtur um stovnsmørk teir góðu KT-førleikarnar, sum longu eru í undirvísingargeiranum

Úrslitið av tilgongdini er ein KT-heildarætlan fyri skúlaverkið. Hendan heildarætlan varð handað landsstýrismanninum tann 4. september 2020.

Strategiin, ið er orðað, fevnir um trygd og verju av persónsupplýsingum, trygt KT-undirstøðukervi, rakstur og support, og menning av einari lestrarfyrisitingarskipan, ið er felags fyri Fróðskaparsetur Føroya, miðnámskúlaøkið, yrkisútbúgvingarøkið, maritima útbúgvingarøkið og fólkaskúlan.

Strategiska kósin er, at vit framyvir í nógv størri mun enn áður skulu verða felags um at menna, seta í verk og reka allar týðandi KT-loysnir í undirvísingarverkinum.

Vit skulu verða felags um:

- Menning av KT-skipanum og hava felags stamdata og felags standardir fyri grundskráir og dátasamskifti
- KT-pallar og portalar fyri leiðslukunning og hagtøl
- KT-undirstøðukervið, KT-rakstur, hýsing, support og keyp av útgerð, lisensum v.m.
- KT-trygdarpolitikkir og KT-skipanir
- Leiðslu-, organisatións- og førleikamenning

Heildarætlan er gjørd saman við øllum týðandi áhugapørtum, og breið undirtøka er fyri tilmælunum. (Sí skjal 1: Heildarætlan fyri undirvísingarverkið 2021-2024)

## 1.2. Galdandi lóggáva

Talan er um verklagslóg, ið heimiðlar landsstýrismanninum at fremja ávísa verkætlan, og tískil er ikki onnur lóggáva, ið er galdandi fyri sama økið.

## 1.3. Endamál

Yvirskipaða endamálið við uppskotinum er at fáa til vega materiella heimild til at nýta ta játtan, ið Løgtingið hevur latið til menningina av KT-heildarætlanini. Endamálið við ætlanini er lýst niðanfyri og í frágreiðingini "*Saman um eina trygga KT-loysn,*" ið Undirvísingarstýrið hevur latið gera.

**Endamálið við heildarætlanini er, at:**

- Økja um KT- og dátutrygdina í undirvísingargeiranum
- Økja um dygdina í upplýsingum um næmingar og lærugreinar (dátarikin skúlamenning)
- Veita skjótt og álítandi avgerðargrundarlag fyri politikk- og sektormenning
- Betra um samskiftismøguleikar millum skúla, fakfólk, næmingar og foreldur
- Beina burtur dupultarbeiði í fyrisitingini á skúlum, hjá myndugleikum og hjá næmingum
- Skapa fyritreytir fyri munadyggum eftirlits- og myndugleikaarbeiði

**Fyri at røkka endamálum, skulu tvey høvuðsátøk fremjast**

1. Stovna "Skúlanet", sum er ein felags rakstrar- og supportorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar. Skúlanet er ein KT-felagskapur umboðandi Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám, yrkisnám, Fróðskaparsetur Føroya og KT Landsins. Størsti parturin av uppgávunum verður útveittur til føroysku KT-vinnuna.

2. At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan, sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnám, yrkisnám og Fróðskaparsetur Føroya. Lestrarfyrisitingarskipanin veitir talgilda skúlaumsiting, felags lærupallar og tíðarhóskandi talgilt samskifti millum skúla, næming og heim.

**Týðandi fyritreyt er samstarv við Talgildu Føroyar og KT-landsins**

Heildarætlanin er gjørd í samstarvið við Talgildu Føroyar og KT Landsins, sum hava verið umboða í stýrisbólkinum og í arbeiðsbólkum.

Formligar avtalur verða gjørdar við KT-landsins um menning, rakstur og support av Skúlaneti og við Talgdu Føroyar um at gagnnýta og menna førleikar og undirstøðukervið og teir tøkniligu pallar og hentleikar, sum just eru verksettir. Hetta snýr seg millum annað um sjálvvirkandi dátudeiling millum skúlar og myndugleikar umvegis *Heldina* og sjálvgreiðsluloysnir umvegis *Vangan og Talgilda samleikan* og gagnnýtslu av *grunddátum*.

Samstarvið vil spara tíð, orku og pening og vil minka um teir vælkendu váðar, sum eru í slíkari fjøltáttaðari verkætlan.

**Um úrtøku og nyttu av heildarætlanini fyri samfelagið og undirvísingarverkið**

Samfelagsnyttan, sum er av talgilding, er spard orka, betri og bíligari tænastur, ein styrkt KT-vinna, hægri KT- og dátutrygd, gjøgnumskygni í umsitingini og rættartrygd fyri borgaran.

Heildarætlanin fyri undirvísingarverkið er yvirskipað ein tilgongd, har KT-avbjóðingarnar verða loystar í felagskapum og við felags loysnum. Talan verður um grundleggjandi umskipan við *felags* rakstri, support, keyp, menning, førleikamenning, verkseting, viðlíkahaldi og víðarimenning.

Hetta fer at geva stórrakstrarfyrimunir og synergi, og verður grundarlag fyri, at undirvísingarstovnar og myndugleikar fáa atgongd til førleikar og tænastur á einum heilt øðrum støði enn í dag, og er ein avgerandi fyritreyt fyri, at kunna liva upp til galdandi reglur um KT-trygd og verju av persónsupplýsingum.

Talgildingin fer at gera gerandisdagin lættari hjá næmingum, foreldrum og starvsfólkum á undirvísingarstovnum og hjá teimum myndugleikum, sum vara av. Ítøkilig dømi eru:

**Børn, ung og foreldur:**

- Betri og tryggari samskifti við skúla, fakfólk, og onnur
- Atgongd til felags pallar (læring, samskifti og fyrisiting)

**Leiðslur, lærarar og fyrisiting:**

- Dagførd og tøk data um uppmøting, skrivlig avrik og fráfall.
- Sparda orku og pening til menning, innkeyp, support og hýsing.
- Minni dupultarbeiði í fyrisitingini í skúlunum og hjá avvarðandi myndugleikum.
- Lættari og tryggari samskipan og samskifti við flokkin.
- KT-vegleiðarar (lærarar), ið hava betri stundir at hugsavna seg um sínar høvuðsuppgávur (KT-nýtsla, venjing, KT-pedagogisk menning), ístaðin fyri eitt nú support og at standa fyri at keypa KT-skipanir og aðra KT-útgerð.

**Eftirlit, trygd og dátuvernd:**

- Økt KT-trygd og dátuvernd á øllum økjum.
- Ikki eins tengt at ávísum persónum.
- Grundarlag fyri skynsamari eftirliti og arbeiði hjá myndugleikunum.

**Politik- og skúlamenning:**

- Størri góðska í kunningini um næmingar og fak (dátustýrd skúlamenning).
- Betri grundarlag fyri politiskum avgerðum og fyri at menna geiran sum heild á upplýstum grundarlagi.

### Ein verkætlanarskipað strategisk KT eind stendur á odda og samskipar

Ein strategisk KT-eind verður skipað í Undirvísingarstýrinum, sum fær ábyrgd av at samskipa menning, verkseting, rakstur og support. Eindin verður mannað við einum deildarleiðara (verkætlanarstjóra) og trimum fakábyrgdarum (verkætlanarleiðarum) fyri ávikavist LFS, Skúlanet og útbúgvingardáta.




Mynd: Leiklutir, ábyrgd og átøk verða samskipað og raðfest í samstarvi við áhugapartarnar í undirvísingarverkinum, sum verða umboðað í stýrisbólki, ráðgevandi leiðsluforum, tílvísingarbólkum ella sum limir í arbeiðsbólkum innan tey ymisku økini.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Heildarætlanin fyri KT-umsiting í undirvísingarverkinum 2021-2024 fevnir um tvey høvuðsátøk, sum eru:

1. At stovna ”Skúlanet”, sum er ein *felags* rakstrar- og supportorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar.

2. At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarliga KT-skipan, sum er *felags* fyri fólkaskúlar, miðnáms- og yrkisskúlar, maritimar skúlar og Fróðskaparsetur Føroya.

Eingin av verandi KT-skipanum lúka krøvini til KT-trygd og dátuvernd, og fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar.

Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri umsiting, planlegging og menning. Ónýttir møguleikar liggja í at samskipa KT-virksemið í undirvísingarverkinum, ið kunnu geva eitt munandi hægri tænastustig, stórrakstarfyrimunir og synergi øllum undirvísingarverkinum til gagns.

Heildarætlanin er á fíggjarlógini fyri 2021 og er í løgukarminum fyri komandi árini. Ein verkætlanarskipað strategisk KT-eind verður sett á stovn í Undirvísingarstýrinum, og kemur hon at standa á odda fyri at samskipa, menna og seta í verk átøkini í hesi heildarætlan.

Avtalur eru gjørdar við KT-Landsins um Skúlanet og við Talgildu Føroyar um samstarv. Hetta samstarvið vil spara tíð, orku og pening, og vil eisini minka um váðar.

Málið er, at Skúlanet og nýggja lestrarfyrisitingarliga KT-skipanin er sett í verk í øllum undirvísingarverkinum í 2025, og at rakstur, viðlíkahald og víðarimenning verður fíggjað innan verandi játtanarkarm.

Almennir stovnar hava saman við føroysku KT-vinnuni ment tryggar og vælvirkandi KT-skipanir fyri borgaran. Dømi eru Skattaskipanin, Búskaparskipan Landsins, Talgilda heilsuskipanin, Útgjaldskipanin í almannaverkinum, Talgildi Samleikin og Vangin, sum nú er settur í verk.

Nú er átrokandi tørvur á at seta sjóneykuna á undirvísingarverkið, sum hevur brúk fyri grundleggjandi endurnýggjan og umskipan av KT-virkseminum, sum fer at gagna samfelagnum og øllum, sum hava tilknýti til undirvísingarverkið.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

# 2. Kapittul. Avleiðingarnar av uppskotinum

## 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

*Avleiðingar fyri landið*

Í heildarætlanini frá september 2020 varð mett, at samlaði kostnaðurin til leiðslu, samskipan, menning, verkseting og rakstur í tíðarskeiðnum 2021-2024 er 89 mió. kr. yvir 4 ár. Av hesum máttu 41,5 mió. kr. fáast sum nýggj játtan á løgtingsfíggjarlógini.

Á langtíðar løgukarminum, sambært fíggjarlógini fyri 2021, eru 40 mió. kr. settar av til heildarætlanina komandi fimm fíggjarárini. Verkætlanin er tillagað samsvarandi, og áramálið verður 2021-25 í staðin fyri 2021-24.

Írestandi fíggingin er longu inni í skipanina sum fígging til rakstur av verandi KT-virksemi í undirvísingarverkinum, og er tískil ikki partur av uppskotinum til verklagslóg.

Mett verður, at framhaldandi KT-rakstur, viðlíkahald og víðarmenning kann fíggjast innan verandi rakstrarjáttan við raðfesting og umskipan á grein 7 í fíggjarlógini. Talan verður so-statt ikki um eina sparing í krónum og oyrum, men um at man fær ein samlaða loysn, ið er bæði betri og tryggari enn verandi skipanir, og at man tískil sum heild fær meira gagn av somu játtan.

Meira yvirskipað, so fer KT-økið í síni heild at føra við sær øktar útreiðslur í framtíðini. Hetta stendist m.a. av krøvum til KT-trygd og krøvunum til vernd av persónsupplýsingum. Heildarætlanin tryggjar, at hesar avbjóðingar kunnu verða loystar á nøktandi hátt.

*Avleiðing fyri kommunurnar*

Sjálvt uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Kommunurnar hava í dag útreiðslur til KT í fólkaskúlanum, og hesar útreiðslur koma framhaldandi at vera.

## 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Alt undirvísingarverkið kemur at merkja umsitingarligar avleiðingar av verkætlanini. Skipanir vera savnaðar og sjálvvirkandi dátuflutningur, har tað ber til, millum stovnar, borgaran og starvsfólk koma at lætta munandi um arbeiðsorkuna ið er neyðug. Væntandi verða eisini skrásetingarfeilir, við tað at tað ikki longur verður neyðugt at skráseta somu upplýsingar fleiri ymisk støð.

Yvir tíð vilja loysnir við sjálvavgreiðslum geva borgarum betri innlit í egin viðurskifti og skapa effektivari loysnir fyri skúlar og stovnar.

Við hesi verkætlan fer man at fáa atgongd til hagtøl, skipað eftir altjóða leisti, ið geva neyðugt innlit og samanberingargrundarlag við onnur samfeløg.

## 2.3. Avleiðingar fyri vinnulívið

Talan er um eina munandi upphædd, ið verður nýtt til menning av nýggjari KT-skipan og keypi av KT-útgerð og tænastunum í hesum sambandi. Ætlanin er, í so stóran mun sum gjørlig, at brúka føroyskar veitarar. Umframt tann fíggjarliga fyrimunin, ið hetta gevur føroyskum fyritøkum, so fer verkætlanin at verða við til at menna førleikarnar í føroysku KT-vinnuni.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Talgilding av tænastum letur upp fyri, at minni pappír verður brúkt í privatari- og almennari umsiting. Aðrar avleiðingar eru fleiri teldur og meira streymur til servarar og køling. Hinvegin verða færri kopimaskinur og prentarar.

Annars er talan um at menna eina KT-skipan og at skipa eitt KT-infrakervi, og hevur hetta onga beinleiðis ávirkan á umhvørvið í Føroyum.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Við LFS og Skúlaneti fáa næmingar og starvsfólk eitt einsháttað KT-tilboð uttan mun til, hvønn skúla ella hvørja kommunu tey hoyra til, og uttan mun til stødd og staðseting av skúlanum.

T.v.s. at stovnar í útjaðaranum ella á útoyggj fáa eins tænastustig, sum teir stóru og nýggjastu stovnarnar fáa í dag, sum hava egnar KT-deildir.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir annað enn, at tað sum heild fer at lætta um umsitingina av undirvísingarverkinum og fer at hækka um tænastustøði til teir borgarar, ið so ella so eru knýttir at undirvísingarverkinum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Grunddátaskráir verða bygdar í samsvari við altjóða flokkingarmeginreglur. Talan er um ECTS-skipanina (European Credit Transfer System), EQF-skipanina (European Qualification Framework) og ISCED-skipanina (International Standard Classification of Education).

At nýta felags flokkingarmeginreglur tryggjar greidleika og gjøgnumskygni, gevur okkum eitt væl skipað hagtalsgrundarlag um okkara útbúgvingar, sum kann samanberast beinleiðis við altjóða hagtøl.

At brúka altjóða flokkingarmeginreglur kann harumframt gerast eitt amboð til viðurkenning av útbúgvingum í Føroyum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) *Hoyvíkssáttmálin*

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at Hoyvíkssáttmálin er viðkomandi fyri uppskotið.

*2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS*

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at EMRS er viðkomandi fyri uppskotið.

*3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at sáttmálin er viðkomandi fyri uppskotið.

**2.9. Markaforðingar**

Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Uppskotið hevur ikki við sær revsing, sekt, pantiheimild ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Uppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

**2.12 Gjøld**

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13 Áleggur uppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldir?**

Nei

**2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Ja, uppskotið heimilar landsstýrismanninum at brúka 40 mió. kr. til at fremja KT-heildarætlanina.

**2.15. Gevur uppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Nei

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Nei

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

## 3. Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Landsstýrismaðurin fær heimild at fremja KT-heildarætlanina, ið man politiskt hevur avgjørt at raðfesta. Mesta mark er ásett til 40 mió. kr., ið er upphæddin, sum man hevur avgjørt at seta av fíggjarárini 2021-25. At "fremja" í hesum samanhangi merkir at menna og verkseta lestrarfyrisitingarkipanina og at verkseta Skúlanet, umframt tann rakstur, ið stendist av menning og verksetan í tíðarskeiðinum 2021-2025.

**Til § 2**
Ásetan um gildiskomu og sólsetur.

Jenis av Rana

*landsstýrimaður*

/Poul Geert Hansen

**Hjáløgd fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Heildarætlan fyri Undirvísingarverkið 2021-2024

*Fylgiskjal 2: Hoyringssvar*